Tinghellan

Ganga hvør sær ella saman

Nú er ikki meir enn vika eftir til valið, og mangir valstríðshugaðir føroyingar leggja árar í sjógv at vinna spurtin móti politiska málinum. Kári á Rógvi heldur á Tinghelluni í dag fram við hugleiðingum sínum um, hvat bíðar vinnarunum, tá ið valið tað er av.

Vit nevndu í gjár, at uppgávan hjá nývalda tinginum í fyrstu atløgu er at velja løgmann eftir eini mannagongd, ið fekst í lag við yngru stýrisskipanarlógini. Ert tú nývaldur limur í einum av tingflokkunum, ert tú við at gera av, hvønn tín floksformaður skal vísa á sum samráðingarleiðara í samgonguroyndunum.

Allarhelst hevur hann tó avtalað við tveir av hinum formonnunum (og teir eldru í tingbólkinum) longu valkvøldið, men hann spyr tykkum helst eftir, og í teirri løtu hava tit tykkara størstu ávirkan, nakað sum tá vit veljarar seta krossin valdagin.

Tann tilnevndir samráðingarleiðarin verður helst eisini løgmaður. Men, hann skal tó tryggja sær, at hann ikki hevur ein meiriluta av tykkum 32 ímóti sær. Tí fer hann undir samgongusamráðingar.

Gongan sum gekk saman

Samgonga er hjá okkum, ið fáast við seyð, tað at geva grannahaganum boð, tá vit fara á fjall. Seyðamaðurin úr grannahaganum kemur so við at reka og hjálpa okkum at skilja seyðin, alt eftir hvør hagi eigur. Samgonga hjá óðalsfólkinum er sostatt ein skipan at tryggja samstarv og virðing fyri rættindunum hjá hvørjum øðrum.

Politiska samgongan tryggjar sum fráliður hvørki samstarv ella virðing. At skipa politiska samgongu minnir meir um eitt arvaskiftli við ónøgdum arvingum. Til tess at tryggja at tingmenninir ikki skulu blanda seg uppí politikk, er tað so visiliga innrættað, at tit hava bert 10 + 4 dagar at skipa hesa samgonguna. Eydnast tað ikki, skulu tit aftur at vitja tann gamla formannin og kunnu so fáa tríggjar ferðir fýra dagar at býta búgvið.

Skjalið og sessirnir

Samráðingarnar um samgongu hava tvey endamál. Tað fyrra at býta landsstýrissessir. Tað seinna at skriva eitt skjal, samgonguskjalið. Tíðin er alt ov stutt til at kunna gera nakað sum bara líkist eini veruligari ætlan fyri at stýra hesum landinum við 47.000 sálum, átta aðalstýrum, 100-tals stýrum, stovnum og deildum, og 1.000-tals reglum, lógum og fyriskipanum. Tað tit áttu at gjørt var at siga: 'vit vita ikki enn, hvat vit fara at gera; lat okkum tosa um tað sum hesi fýra árini liða, og lat okkum royna at semjast við andstøðuna um so nógv sum til ber'. Men, í staðin, siga og skriva tit eitt samgonguskjal, ið stjelur orðingar frá teimum undanfarnu. Vanliga er ein síða nýtt tilfar, meðan restin er sovorðið sum: 'miðvíst verður arbeitt fyri einum greiðum útjaðarapolitikki', 'ítøkilig stig verða tikin at veita útinnandi listini betri umstøður', ella 'landbúnaðurin skal skipast betri til tess at veita alsamt størri íkast til samfelagsbúskapin'.

Samgonguskjalið líkist rættiliga nógv valskráunum hjá flokkunum. Skattatrýstið skal lættast, útreiðslurnar hækkast, tann almenna fyrisitingin skal gerast greiðari, og fleiri samfelagsbólkar skulu hava eina serliga umsiting at hjálpa júst teimum. Men fyrst og fremst líkist samgonguskjalið valskráunum á tann hátt, at roknistykkið gongur ikki upp. Tað ber ikki til at fáa kabalina at ganga upp, og teir ymsu landstýrismenninir fara helst at leggja dent á tann partin av skjalinum, sum teimum sjálvum dámar best.

Landsstýrið er mønan

Tá samgonguskjalið er liðugt og lisið (tað ljóðar oftast nakað sum ein norsk ynskikonsert: ymiskt løgið kemur 'frem fra glemslen') og undirskrivað býta tit landstýrisessinar á skinninum. Annar av teimum stóru flokkunum fær løgmann, hin fær figgjarmál og fiskivinnu. Tann ella teir smáu fáa mentan ella olju, teir stóru býta so restina.

Nú er so tann fyri teg mest avgerandi løtan næstu fýra árini komin. Sleppur tú úr aftur tí tinginum, sum tú júst ert valdur í?

Hetta kann kanska tykjast løgið, men soleiðis er so mangt so undarligt. Við orðunum hjá einum av sitandi landstýrismonnunum, so verður tú tann "sum ber avgerðir niðan í tingið", um tú gerst landstýrismaður. Ávirkanin hjá tær á skipanina verður eitt sindur størri, tí meðan tingið er tað lítla høvdið á tí stóra kroppinum, so eru landstýrismenninir partur av mønuni og kunnu ávirka samskiftið millum gøgnini og høvdið.

Vit skulu í eini seinni grein siga nakað meira um landstýrismenn. Lat tað vera nóg mikið fyri hesuferð at siga, at ert tú partur av samgonguni, men situr eftir á tingi, tá teir stóru fara út í Tinganes, so er best ikki at vænta sær ta heilt stóru ávirkanina á landsins politikk næstu fýra árini. Títt starv verður tá heldur at verja tínar elskaðu leiðarar móti álopum og ágangi frá andstøðuni.

Lítla ávirkan og onga tíð

Ert tú endað í anstøðu, fært tú heldur meiri ávirkan. Ikki ávirkan at broyta nakað stórvegis til tað betra, uttan heldur ávirkan at steðga ymsum uppskotum hjá samgonguni. Fjølmiðlunum dámar at vera 'kritiskir'. Tí sleppur tú vanliga altíð framat at finnast at samgonguuppskotum, og tá bakka landstýrismenninir ofta.

Annars verða tey næstu fýra árini merkt av tingsins árstíðum. Á ólavsøku er skrúðgongan og løgmansrøðan. Síðani halda tingmenn hvør sína røðu um løgmansrøðuna og annars um alt og onki. Sum tey fýra árini ganga harðnar brikslið alt meira. Eftir júst hetta valið er eisini væntandi, at mikið agg frá farna valskeiði og illsemja um gongdina næstu árini flytur við, so beiskleikin verður at merkja longu í ár.

Í Heyst skulu tit samtykkja figgjarlógina. Hon er í veruleikanum ikki ein lóg, men ein figgjarætlan. Nógv tað mesta er tó nógv avgjørt frammanundan, tí ymsar lógir og ynskini frá aðalstýrum, stýrum og stovnum tilsamans eru nógv størsti parturin av figgjarlógini. Tú kanst í mesta lagið rokna við at sleppa at flyta eina millión ella báðar tvær.

Móti jólum koma tey lógaruppskotini, sum 'mugu samtykkjast áðrenn árskiftið'. Tú kemur tær neyvan at innrømma, at tú ikki skilur so nógv av teimum, og undir øllum umstøðum atkvøður samgongan fyri og anstøðan ímóti. Tað sama endurtekur seg eftir 5. mars áðir eftir, tá tingárið er um at enda.

Tá alt hetta er sagt, skal tó eitt innarligt ynski um góða eydnu fylgja tær frá okkum á Tinghelluni.

Vónandi fert tú at trívast!

Tríggir tingmenn er undantakið

Sambandsflokkurin hevur verið drúgvastur í Norðurstreymi. Men Tummas Arabo eigur persónliga atkvøðumetið. Tað setti hann í 1984, og seks ár seinni fekk hann aftur sera nógvar atkvøður

NORÐSTREYMOYAR VALDØMI

Í blaðnum í gjár fóru vit undir greinarað, sum verður at síggja í øllum bløðunum inntil valdagin. Tað er Jóannes Hansen, samfelagsfrøðingur, sum lýsir, hvussu gongdin hevur verið í valdømunum síðani 1966, tá ásetingarnar vóru broyttar, so tað bara vóru tey persónligu atkvøðutølini, sum gjørdu av, hvør kom á ting fyri flokkarnar, ið høvdu størstu undirtøkuna. Í gjár varð Norðoya valdømi umrøtt, og hesa ferð er tað Norðurstreymoy

Í valskeiðnum, sum verður liðugt komandi týsdag, hevur Norðstreymoy átt tríggjar tingmenn. Umframt tey bæði umdømisvaldu umboðini, sum valdømið sambært vallógini eigur trygd fyri, hevur hetta skeiðið verið ein eykavaldur tingmaður fyri Norðstreym.

Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava átt umdømisvaldu sessirnar, og Javnaðarflokkurin hevur havt ein eykavaldan.

Oftast er tað úr teimum stóru valdømunum, at eykavaldu umboðini koma á ting. Men tað er kortini ikki fyrsta ferðin, at Norðstreymoy eiga tý umboð. Fólkaflokkurin átti eykavaldan mann í Norðstreymi stutta valskeiðið frá 1978 og til 1980, og tá Tjóðveldismaðurin aftur kom á ting í 1984, eftir at hann hevði verið uttanfyri í fýra ár, var hann eykavaldur.

Sambandið drúgvast

Síðani floksbýtið í 1906 hevur Sambandsflokkurin á hvørjum vali átt umdømisvaldan tingmann í Norðstreymoy. Undantakið er valskeiðið, sum nú er um at vera liðugt. Á valinum fyri fýra árum síðani stillaði Maria Hansen, sum hevði verið sambandsumboð í fýra ár, eftir at hon var vorðin kend í politikki sum bygdarráðsformaður í Vestmanna, ikki uppaftur, og tá gjørdist Sambandsflokkurin ov stuttur. Honum restaði tredivu atkvøður í at røkka næstfremsta plássinum og harvið umdømisvaldum tingmanni.

Hans Iversen í Kvívík umboðaði sambandsflokkin í Norðstreymi í 31 ár. Tá hann ikki stillaði uppaftur í 1966 kom Tummas Joensen i Kollafirði inn. Men í 1970 vann Agnar Nielsen, sum hann sat í inntil í 1990. Tá kom Terje Davidsen í Kollafirði inn, og so var tað, at Maria Hansen í Vestmanna fekk flestu sambandsatkvøðurnar í 1994.

Á valinum fyri fýra árum síðani var Tjóðveldisflokkurin væl størstur í valdømunum. Hetta var aðru ferð, at Tjóðveldisflokkurin var størstur, tá vit rokna frá 1966. Hin ferðin var í 1974. Tjóðveldið fekk fyrstu ferð mann í Norstreymi í 1958. Tá varð Sigurð Joensen, sáli, valdur, og hann varð afturvaldur í 1962 og í 1966. Í 1970 fall hann fyri Jógvani Durhuus, sum hevur verið tjóðveldisumboðið hjá norðstreymoyingum. Í bakkspeglinum kunnu vit siga, at valið í 1966 boðaði frá, at Sigurð Joensen sat eitt sindur leysur. Tá fekk hann 132 persónligar atkvøður, sum er tað lægsta ein umdømisvaldur í Norðstreymi hevur havt síðani 1966.

Tvær ferðir er Jógvan Durhuus ikki komin á ting. Tað var í 1978 og aftur í 1990.

Fólkaflokkurin átti í nógv ár so at siga fast pláss í Norðstreymi. Í 1943 varð Óla Jákup Jensen valdur, og á øllum valunum frá 1945 og inntil í í 1954 umboðaði Fríðrikur Bláhamar Fólkaflokkin. Síðani tá hevur flokkurin bara tvær ferðir átt umdømisvaldanmann. Í 1980 og so í hesum valskeiðnum.

Kollfirðingar óstøðugir

Fyrstu ferð Javnaðarflokkurin fekk mann valdan í Norðstreymi var í 1984. Tá gjørdist flokkurin størstur í valdøminum, og Tumas Arabo fekk 456 persónligar atkvøður. So góðan persónligan stuðul hevur eingin fingið fyri ella síðani.

Javnaðarflokkurin var eisini størstur í 1990. Tað var ta ferðina, at hann hevði eitt sovorðið rimmar val, fekk tíggju tingmenn, m. a. tí tað sat so mikið væl, at hann fekk umboð í øllum teimum trimum smáu valdømunum. Ta ferðina fekk Tummas Arabo 347 atkvøður, sum er næsthægsta talið, nakar hevur fingið í Norðstreymi.

Onkur hevur sagt, at við løgtingsvali hjá kollfirðingum er tað sum við yoyo. Tað er aðru hvørja ferð upp og aðru hvørja ferð niður. Eftir rimmarvalið í 1984 fall javnaðarumboðið í 1988, og eftir rimmarvalið í 1990 fall hann aftur í 1994.

Fyri fýra árum síðani savnaðu kollfirðingar seg um Jákup Suna Joensen á fólkaflokslistanum, og hann varð umdømisvaldur. Javnaðarflokkurin datt niður á fjórða plássið. Men teir fingu kortini mann. Hans Pauli Strøm var eykavaldur. Hetta var fyrsta ferðin, at javnaðarmaðurin í Norðstreymi var eykavaldur. Tað komst m. a. av, at umdømisvaldi maðurin hjá flokkinum í Sandoyar valdømi fall.

Spenningurin

Tað hevur sera stóran týdning fyri endaliga valúrslitið, hvussu tað fer at laga seg í smáum valdømunum. Ikki minst í Norðstreymi, har gongdin tær síðstu nógvu ferðirnar hevur víst, at tað er stór kapping millum stóru bygdirnar – Vestmanna og Kollafjørð – og at veljararnir hava kanska meiri í huga, hvør persónurin er og serliga hvar hann býr, enn teir hugsa um flokkin, sum hann umboðar.

Nú er Jákup Suni Joensen ikki á fólkaflokslistanum. Einki av valevnunum hjá Sambandsflokkinum hevur áður verið á tingi. Hans Pauli verið tingmaður í fýra ár. Hann hevur sitið á ytsta mandatinum hjá Javnaðarflokkinum – einasti eykavaldi tingmaðurin hjá teimum. Á valinum fyri fýra árum síðani var Tummas Arabo 29 atkvøður ov stuttur. Nú er nýtt javnaðarvalevni í Kollafirði.

Jógvan Durhuus hevur við onkrum undantaki vart borg fyri Tjóðveldisflokkin síðani 1970. Hann hevur hvørja ferð síðani 1970 verið tann á tjóðveldislistanum, sum hevur fingið flestu persónligu atkvøðurnar.

Spenningurin er Norðstreymi er stórur. Eitt er, um valdømið aftur hesa ferð fer at megna tríggjar tingmenn. So er tað spenningurin millum bygdirnar, millum persónarnar, millum flokkarnar og harvið eisini um, hvussu samgonguvánirnar fara at verða eftir valið. Spennandi verður tað undir øllum umstøðum.

Kollfirðingar hava við seinastu valini skift nógv millum flokkarnar

savnsmynd: Jens Kristian Vang

NORÐSTREYMOYAR VALDØMI

1966	
Fólkaflokkurin	*298*
Sambandsflokkurin	*370*
Tummas Joensen	152
Javnaðarflokkurin	*294*
Sjálvstýrisflokkurin	*42*
Tjóðveldisflokkurin	*369*
Sigurd Joensen	132
Framburðsflokkurin	*82*
	1.403
1970	
Fólkaflokkurin	*251*
Sambandsflokkurin	*471*
Agnar Nielsen	219
Javnaðarflokkurin	*270*
Sjálvstýrisflokkurin	*22*
Tjóðveldisflokkurin	*353*
Jógvan Durhuus	154
Framburðsflokkurin	*28*
	1.395
1974	
Fólkaflokkurin	*306*
Sambandsflokkurin	*375*
Agnar Nielsen	205
Javnaðarflokkurin	*307*
Sjálvstýrisflokkurin	*40*
Tjóðveldisflokkurin	*459*
Jógvan Durhuus	292
Framburðsflokkurin	*18*
	1.505
1978	
Fólkaflokkurin (eyka)	*339*
Øssur Dam Jacobsen	210
Sambandsflokkurin	*544*
Agnar Nielsen	270
Javnaðarflokkurin	*250*
Sjálvstýrisflokkurin	*62*
Tjóðveldisflokkurin	*443*
Jógvan Durhuus	270
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	*74*
	1.712
1980	
Fólkaflokkurin	*408*
Øssur Dam Jacobsen	281
Sambandsflokkurin	*565*
Agnar Nielsen	223
Javnaðarflokkurin	*246*
Sjálvstýrisflokkurin	*84*
Tjóðveldisflokkurin	*398*
Framburðs– og Fiskivinnuflokkurin	*110*
	1.811
1984	
Fólkaflokkurin	*405*
Sambandsflokkurin	*457*
Agnar Nielsen	231
Javnaðarflokkurin	*560*
Thomas Arabo	456
Sjálvstýrisflokkurin	*68*
Tjóðveldisflokkurin (eyka)	*442*
Jógvan Durhuus	315
Kristiligi Fólkaflokkurin	*45*
	1.977
1988	
Fólkaflokkurin	*491*
Sambandsflokkurin	*578*
Agnar Nielsen	227
Javnaðarflokkurin	*477*
Sjálvstýrisflokkurin	*65*
Tjóðveldisflokkurin	*546*
Jógvan Durhuus	304
Kristiligi Fólkaflokkurin	*73*
Framsóknarflokkurin	*32*
	2.262
1990	
Fólkaflokkurin	*419*
Sambandsflokkurin	*466*
Terje Davidsen	166
Javnaðarflokkurin	*651*
Thomas Arabo	347
Sjálvstýrisflokkurin	*81*
Tjóðveldisflokkurin	*410*
Kristiligi Fólkaflokkurin	*72*
Sosialistiski Loysingarflokkurin	*44*
	2.143
1994	
Fólkaflokkurin	*248*
Sambandsflokkurin	*564*
Maria Hansen	192
Javnaðarflokkurin	*295*
Sjálvstýrisflokkurin	*83*
Tjóðveldisflokkurin	*323*
Jógvan Durhuus	161
Kristiligi Fólkaflokkurin	*60*
Miðflokkurin	*89*
Verkamannafylkingin	*165*
Føroyski flokkurin	*57*
Frælsisfylkingin	*40*
	1.924
1998	
Fólkaflokkurin	*476*
Jákup Suni Joensen	144
Sambandsflokkurin	*446*
Javnaðarflokkurin (eyka)	*438*
Hans Pauli Strøm	132
Sjálvstýrisflokkurin	*92*
Tjóðveldisflokkurin	*599*
Jógvan Durhuus	231
Kristiligi Fólkaflokkurin	*11*
Miðflokkurin	*48*
Verkamannafylkingin	*14*
	2.124